# Fantastiskir tónar á Vaglinum





**Leygardagin var langur leygardagur í Miðbýnum í Havn. Afturvið hesum komu svingandi tónar frá vaglinum, ið Speaker og 48 pages stóðu fyri**

UMMÆLI
*Eyðun Müller Thomsen*

Tað var langur leygardagur og lukturin av køkum og heitum kakao spreiddi seg yvir miðbýin. Komst tú nærri við vart tú meira hugtikin av tí spennandi tónleikinum, sum sveimaði í luftuni. Tónleikabólkarnir Speaker og 48 pages høvdu lagt fram eina deiliga skrá fyri vaglinum leygardagin um 14.00 tíðina. Millum annað seldu teir køkur, kaffi, kakao við meira, samstundis, sum teir løgdu fram eitt sindur av teirra egna tónleiki. Veðrið var fínasta slag og fitt av fólki var eisini og stuðlaði tiltakinum. Tiltakið var til frama fyri einari ferð til Íslands, sum Speaker og 48 pages standa við. Túrurin verður í juli mánaði og bólkarnir arbeiða sanniliga hart fyri sínari sak.

Tiltakið eydnaðist bara væl og er hetta ikki tað seinasta av sínum slag. Ungu tónleikarinir hava nógvar spennandi ætlanir fyri framman.



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MARS 2004**

**SKRÁIN VIKA 14–15**

**Listaframsýning við grafiskari list hjá Åse Bømler (FO) er í húsinum til 18. apríl**

**Listaframsýning hjá listamanninum Lennart Iverus (SE) er í húsinum til 18. apríl**

**Hósdagur 1. apríl**
**Kl. 19.30** **Orfeuskonsert (FO)** Monika Stauss Joensen (FO) violin og Ólavur Jakobsen (FO) guitar. Spæld verða eldri og yngri klassisk verk. Nærri um skránna á www.nlh.fo.

**Leygardagur 3. apríl**
**Kl. 17.00** **Sjónleikurin "Kaktusblóman"** Klaksvíkar Sjónleikarafelag (FO) Atgongumerki kr. 125.- verða seld í Kunningarstovuni í Havn og Norðurlandahúsinum.

**Mikudagur 7. apríl**
**Kl. 19.00** **Suzuki næmingakonsert (FO)** Fyrirskipari er Suzukifelagið í Føroyum Ókeypis atgongd.

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

Sosialurin 341800

# Buldrandi og sparkandi tónar

**– komu bóltandi við fullari ferð frá Margarinfabrikkini leygarkvøldið**

UMMÆLI
*Eyðun Müller Thomsen & Andreas Dalsgaard*

Fyrsti bólkurin á tí vælumtókta rokk pallinum á Margarinfabrikkini vóru ungu harrarnir í nýggja bólkinum »The Story Ends«. Bólkurin legði fram viðlagnum, »Mín pullhundur er einsamallur«. Tónleikurin, teir spældu, var »straight up alternative punk ass«..... stutt sagt. Bólkurin átti pallin hetta kvøldið, og teir tóku áskoðaranir á bóli við teirra »KICK ASS« framførslu. Bólkurin er sera nýggjur og hevur síni ting at hyggja nærri uppá. Tað einasta eg saknaði var samanspæli, men tað var skíti líka mikið. Teir rockaðu, suckaðu og vit brokkaðu ikki. Í bólkinum eru. Philip (Guitar, sang) - Hanus (Guitar, bass, crazy) Heini Mohr (Bass, guitar) Andreas (Trummur). Hetta var fysta konsertin hjá bólkinum í tórshavn men als ikki tann seinasta.

Rakettin tendraði og for við fullari ferð uppeftir. »thumbs up« til The Story Ends

## Lama sea

Næsti bólkurin var Lama sea. Teir framførdu fýra løg og vóru tvey av teimum sjálvgjørd, og hini tvey løg hjá Led Zepplin og The White Stripes. Teir byrjaðu við lagnum »Hill Billy« sum var eitt ógvuliga feitt lag við ordiligum futti í! Og Janus Rasmussen, sum eisini syngur í Speaker, sang og spældi guitar og sang sum ikki einaferð ótrúliga væl! Lama sea var bólkurin sum hevði besta samanspælið leygarkvøldið. Tað er heilt sikkurt. Síðsta lagið teir spældu »Fell in love with a girl« hjá The white stripes, var nakað av tí mest ófantaliga og feitasta eg havi hoyrt! Røddin skuldi slítast og guitarirnir spælast úr stemmu, simpulthen bara »eg sk*** á tað« tónleikur!

Lama sea vóru bara ófantaligur 70´ara rokk/punkur fyri allar pengarnar og tað var ótrúliga feitt! Í hvørfall mín yndisbólkur av teimum trimum leygarkvøldið.

## Side Effect

Side Effect var triði og síðsti bólkurin sum fór á pallin. Teir eru tríggir mans í talið og eru teir millum annað kendir frá Prix Føroyum. Side Effect er simpulthen bara hart rokk/tekno um man kann kalla tað so! Um man er til tað slagið av tónleiki so fæst einki betur enn Side Effect, og eg haldi at tað er feitt at sovorin tónleikur eisini kemur fram í Føroyum. Sangirnir vóru rættuliga langir og kanska eri eg ov gamal, men tað bleiv eitt sindur ov hart at lurta eftir til endans. Tónleikurin er kanska betur egnaður til eitt stað sum er betur pláss, so fólkini ordiliga kunnu flippa út! Men teir duga ómetaliga væl at kompunera tónleik og kombinatiónin av guitarinum og sanginum saman við elektriska tónleikinum, var bara super! Tað ljóðaði ótrúliga feitt hjá teimum og teir høvdu eitt feitt »show«!

Konsertin var til frama fyri Speaker og 48 Pages, sum skulu til Íslands at spæla í summar. Eg vil siga, ein feit konsert og gott at fitt av fólki tók undir, og tað er sera gott at vit hava eitt stað sum margarinfabrikkina, sum ger eitt gott arbeiði at hjálpa ungum tónleikarum/bólkum at koma fram. Stórt herðaklapp til tað!



**UTTAN ÚR HEIMI**

# So hendi tað aftur

**Amerikanararnir hava ikki gloymt myndirnar av tí deyða amerikonska hermanninum, sum varð drigin ígjøgnum gøturnar í somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu fyri ellivu árum síðani. Mikudagin hendi tað sama í irakska býnum Falluja**

KRÍGGJ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tilburðurin, tá fýra amerikanarar í tveimum bilum vórðu álopnir í Falluja, var ikki nakað serstakt, tí júst í hesum býnum hevur mótstøðan ímóti fremmanda hersetingarvaldinum verið serliga stór. Men tað, sum hendi aftaná, gav eina higartil ósædda og ræðuliga mynd av mótstøðuni.

Beint eftir at teir báðir bilarnir vóru álopnir, og eldur var komin í teir, savnaðust irakar í stórum tali rundan um teir. Tey fýra líkini vórðu drigin út úr bilunum og illa viðfarin. Tíðindafólk á staðnum vistu at siga, tvey av líkunum vórðu bundin upp í bilar og drigin ígjøgnum gøturnar, meðan hini bæði vórðu hongd upp undir eina brúgv um Tigrisánna, har uppøstir irakar steinaðu tey.

- Falluga er amerikanaranna kirkjugarður. Leingi livi Islam. Vit hevna Saddam, róptu teir uppøstu irakarnir.

## Ikki afturtøka hesaferð

Sjónvarpsfólk avmyndaðu tað, sum hendi í gøtunum í Falluja, men myndirnar vóru so ræðuligar, at sjónvarpsstøðirnar valdu at gera tær ótýðiligar. Tær fingu kortini amerikanararnar at minnast tað, sum hendi í Mogadishu í Somalia í 1993, tá líkið av einum amerikonskum hermanni varð drigið ígjøgnum gøturnar.

Tá gjørdi USA av at taka seg aftur úr Somalia, men hesaferð verður ikki talan um afturtøku.

- Hetta eru fólk, sum vilja venda aftur til tíðina hjá Saddam Hussein við hópgravum og píningarrúmum. Vit eru ikki komnir higar at hjálpa hesum. Teir verða tvørturímóti tiknir til fanga ella dripnir, segði talsmaðurin á sivilu amerikonsku umsitingini í Bagdad, Dan Senor.

Amerikanska herleiðslan kunngjørdi seinni, at teir fýra menninir í teimum báðum bilunum vóru ikki hermenn, men menn, sum vóru komnir til Irak í sambandi við byggiarbeiði. Tíðindafólk í Falluja siga, at menninir vóru vápnaðir, og at teir vóru í skottryggum búna.

Við teimum fýra doyðu tólv sivilir útlendingar í Irak í síðsta mánað. Mikudagin doyðu eisini fýra amerikanskir hermenn av einari bumbuspreinging, so nú hevur USA mist 600 hermenn í Irak.



*Ein likamslutur av einum av teimum fýra monnunum varð hongdur upp í eina elleiðing*
*Mynd: Reuters*

# Veksandi jødahatur í Evropa

**Tey seinastu trý árini hava jødar og jødiskir stovnar í Evropa verið fyri veksandi ágangi. Serliga í Fraklandi eru jødarnir minni og minni avhildnir**

JØDAHATUR
*Árni Joensen*

Evropeiskir jødar verða happaðir á gøtuni, antijødisk tekin verða málað upp á húsaveggir, og á alnótini eru heimasíður, ið eggja fólki til at seta seg upp ímóti jødunum.

Tað stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing, sum tann serliga rasismudeildin hjá ES almannakunngjørdi fyrradagin. Men hetta er ikki allur ágangurin.

- Vit hava fleiri dømi um, at jødar í Evropa hava verið fyri likamligum ágangi, og at eldur er settur á jødiskar bygningar, stendur í frágreiðingini. Rasismudeildin sigur, at málið er sera álvarssamt. Tað halda teir evropeisku jødarnir eisini.

- Tann gamli svullurin er farin at gera um seg aftur. Jødar í Evropa sleppa ikki at liva eitt vanligt lív, og tað kunnu vit ikki góðtaka. Her má broyting koma í, sigur formaðurin í evropeiska jødafelagsskapinum, Kobi Benatoff.

Stjórin á rasismudeildini hjá ES, Beate Winkler, heldur frágreiðingina vera ræðandi.

- Niðurstøðan í frágreiðingini er nóg mikið til at elva til ræðslu ímillum teir 1,2 millión jødarnar í Evropa, sigur hon.

Í frágreiðingini sæst, at talið á tilburðum við ágangi ímóti jødum í Fraklandi varð seksfaldað frá 2001 til 2002, og í Bretlandi hava tilburðirnir eisini verið væl fleiri enn undanfarin ár. Tað sama er galdandi í Týsklandi, Belgia og Niðurlondum, meðan jødarnir tykjast fáa frið í Spania, Italia, Eysturríki og Grikkalandi.

Rasismudeildin hjá ES mælir limalondunum til at herða løggávuna sum lið í stríðnum ímóti tí veksandi jødahatrinum.